

*Hóast p-bollin ikki er serliga stórur, so hevur hann havt ovurhonds stóran týdning fyri sosialu gongdina í vesturheiminum. Sunnudagin fylti p-bollin fimti ár*

## FAKTA P-BOLLIN

- 9. mai í 1960 kunngjørdi amerikanska eftirlitið Food and Drug Administration, at tey fóru at loyva framleiðsluni av p-bollanum, sum tá longu hevði verið latin kvinnum í eini fleiri ára langari royndartíð.
- Kvinnurnar, ið royndu p-bollan, vóru fyri tað mesta úr Puerto Rico. Tað vóru tó eisini nógvar amerikanskar kvinnur, sum royndu hann fyri pínu og óregluliga mánasjúku.
- Katolikkarnir vóru ídnastu mótmælarar av p-bollanum.
- P-bollin er helst tað týdningarmesta, sum er hent fyri kvinnusakina.
- P-bollin virkar í høvuðsheitum við at forða eggloysn. Tað eru eisini aðrar skipanir, t.d., at skuldi eitt egg komið, so fær tað ikki fest seg í lívmóðurina. Harumframt broytist slímið í lívmóðurini, so sáðkyknurnar ikki vinna ígjøgnum tað.
- So skjótt øllum stóð í boði at fáa p-bollar, vaks talið av kvinnum, sum fullførdu universitetsútbúgvingar, markant.
- Kvinnur fingu eisini høvi at koma út á arbeiðsmarknaðin, tí tær ikki skuldu ansa smáum ella ganga við stórum búki stútt og støðugt.
- Tá óttin fyri at gerast við barn hvarv, vaks kynsliga fríheitin samsvarandi, og brádliga bar til at hava fleiri og skiftandi makar uttan at binda seg.
- Í dag eru yvir hundrað milliónir av kvinnum kring heimin, sum taka p-bollan dagliga.
- Í dag eru eisini fleiri alternativ - t.d. minibollar, p-ringar og p-plástur, ið virka á sama hátt, men sum hava færri hormon.
- P-bollin er góð fyribyrging móti barnsburði, men hann verjir ikki móti kynssjúkum.

hjúnarbandið. P-bollin var eisini marknaðarførdur sum "undrið, ið kann bjarga hjúnarbandinum". Longu fimm ár eftir, at fyrstu p-pollarnir komu á marknaðin, vóru tað seks milliónir kvinnur í Amerika, sum regluliga tóku p-bollan. Tað sigur eitt sindur um tann ovurhonds stóra tørvin, ið var.

### Við ferð kring heimin

P-bollin breiddi seg skjótt um allan heimin, og Týskland var tað fyrsta landið í Evropa, sum longu eitt ár eftir, 1. juni 1961, loyvdi fyribyrging við p-bollum.

Í Danmark vísa tølini, at bert trý ár eftir, at p-bollin kom til Danmarkar, var talið av føddum børnum lækkað við 18.000 árliga. So eingin ivi er um, at ávirkanin í vesturheiminum hevur verið ovurhonds stór.

Tíverri høvdu tey ikki givið sær stundir at kanna hjáárinini nóg væl, og tað vísti seg, at tær fyrstu kvinnurnar gjørdust sjúkar av at taka p-bollan. Har vóru sera nógv hormon í, og tær kvinnurnar sum royndu hann, áðrenn hann kom út á marknaðin, vórðu ikki tiknar fyri fult, tá tær gramdu seg um millum annað høvuðpínu og vaml. Men hetta var bøtt so líðandi, og í dag fáast p-bollar við sera smáum nøgdum av hormunum.

Við fyrsta p-bollanum í Evropa, Anovlar, fingu kvinnurnar 85 milligram av hormonum um mánaðin. Ì dag fáa tær heilt niður í 2,2 milligram um mánaðin.

Hóast p-bollin framvegis er ein av best umtóktu fyribyrgingunum í heiminum, so heldur menningin á, og í dag fáast bæði p-ringar og p-plástur, sum sjálvi lata eina hóskandi nøgd av hormonum út í kroppin ístaðin fyri, at kvinnan skal minnast til at taka eina tablett um dagin.